# - Tað er altíð okkurt at takast við

**Jan Jacobsen hevur seintu trý árini verið útróðrarmaður. Hann roynir sum oftast norðanfyri, og veiðan er á góðari leið: Eini 150 pund uppá stampin**

ÚTRÓÐUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*– Tað er altíð okkurt at takast við tá ein hevur ein bát, sigur Jan Jacobsen av Norðskála, sum seinastu trý árini hevur verið útróðrarmaður burturav*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Oyrarbakki:** Tað er ikki av besta veðri, tá útróðrarbáturin »Gunnvá« kemur stimandi suður gjøgnum Sundalagið henda hósmorgunin.

Tað er væl av vindi og tætt eru millum teir grovu ælingarnar norðaneftir. Men onkur er kortini sum ikki letur seg steðga av slíkum umstøðum.

Vit hava eygleitt henda bátin av Streymoyarlandinum. Komin nakað suður um brúnna snarar hann í stýriborð, og leggur nú leiðina inn í havnalagið á Oyrarbakka.

Eigarmaðurin, Jan Jacobsen av Norðskála hevur drigið nakrar gággulínur, sum skúlu brúkast sum agn til næsta útróðrartúr í komandi viku.

Gággurnar verða fingnar uppá land, har hann enn einaferð kann staðfesta, at lítið er til av gággu.

– Tað er ikki so nógv at fáa her á fjørðinum. Og orsøkin er hin einfalda, at tað verður so nógv roynt eftir gággu, sigur Jan Jacobsen.

## Harður streymur

Henda morgunin hevði hann verið eftir gággu til agn, samstundis sum egningin var í gongd inni í einum skúri á havnalagnum.

Jan var nú sjálvur til arbeiðis umborð á bátinum, har hann var í holtur við ymiskar praktiskar uppgávur umborð.

– Tá ein hevur bát, er altíð okkurt at fjasast við. Er tað ikki viðlíkahald, so er altíð okkurt sum skal umvælast. Tað er altíð okkurt at takast við, sigur hann.

Hann og ein annar maður vóru á útróðri mánadagin í hesi vikuni, og fingu teir tá góð 2000 pund. Øll henda veiðan varð løgd upp hjá Fiskamarknaðinum á Toftum.

Nú riggaðu teir seg so til at fara næsta túrin, men hann verður ikki fyrrenn um nakrar dagar. Helst ikki fyrrenn mánakvøldið ella týskvøldið.

– Streymurin er so harður í løtuni. Og so er veðrið heldur ikki av tí besta, sigur hann.

## Norður úr Mýlingi

Tað er altíð ójavnt, hvussu nógvar línur ið menn taka við sær á hvønn túrin.

Vit prátaðu herfyri við ein annan útróðrarmann úr Rituvík, sum bert hevði einar átta stampar við sær á hvørjum túri.

Men tá tann 33 fót stóri Aqua-Star báturin hjá Jan fer til útróðrar, so hava teir vanliga millum 30 og 40 stampar við.

Meðan hesin útróðrarmaðurin úr Rituvík, Benadiktus Olsen plagdi at royna úti fyri heimbygd sínari, so fer Jan sum oftast norðureftir at seta línurnar.

– Eg royni sum oftast millum tríggjar og seks fjórðingar úr landi, norður úr Mýlingi, sigur hann.

Og líkt er eisini til, at fiskur er at fáa á hesum leiðum.

## Gággan er best

Eins og tað er við reiðskapi og fiskileiðum, so er eisini ójavnt, hvat menn fáa uppá stampin.

Áðurnevndi Benadiktus segði seg vera nøgdan, um hann fekk 100 pund uppá stampin. Men hjá Jan er úrslitið sum oftast betri enn so.

– Vit plaga at liggja um 150 pund uppá stampin, sigur hann.

Jan brúkar nógv ymisk sløg til agn – kúfisk, gággu og høgguslokk.

– Men eg haldi tó, at gággan er tann besta av hesum, sigur Jan.

## Fagna tjaldrinum innanveggja

**Oyrarbakki:** Ilt er at meta um, hvussu veðrið fer at vera í dag, sjálvan grækarismessudag. Boðað er bæði frá nógvum vindi, kava og kulda.

Men fyrireikararnir av einum serstøkum tiltaki í Eydnuni á Oyrarbakka í kvøld, nýtast ikki at hugsa um tað, tí hetta grækarismessutiltakið verður innandura undir øllum umstøðum.

Teir bjóða nevniliga fólki til eina hugnaliga løtu, har nógv ymiskt er á skránni. Løgtingsformaðurin, Edmund Joensen fer á hesi hugnaløtu at hava tað, hann kallar »Lokalar hugleiðingar«, áðrenn Ingvard Fjallstein við teksti og myndum fer at siga frá um Stórá við Norðskála. Annars er leikur og tónleikur á skránni, og sjálvandi eisini nógvur felagssangur.

**sb.**

## Skúlin skal lúka øll krøv

**Strendur:** Tíðin er nú komin til at okkurt verður gjørt við Stranda skúla, so at hann kann løka tey krøvini, sum sett verða í dag.

Skúlin varð tikin í nýtslu í 1969, og var útbygdur í 1984. Fyrst í 90'unum varð ein lítil goymslybygningurin gjørdur, men síðani tá er næmingatalið økt, eins og tann nýggja fólkaskúlalógin hevur sett skúlanum onnur og størri krøv. Í dag ganga umleið 250 børn í skúlanum.

Nú er so ætlanin at fara undir hetta við dagføringini, og eftir ein fund í næstu viku, verður helst nærri at frætta um, hvussu arbeiðast skal víðari við at røkka hesum máli í framtíðini.

**sb.**

## Fáa ikki tikið ímóti fleiri klæðum

**Klaksvík:** Hesi seinastu mongu árini er nógv føroysk hjálp farin til Rumenia. Fleiri føroyingar hava sæð tað sum sína uppgávu at stuðla hesum landinum við hjálp av ymiskum slagi.

Ein teirra, sum íðin hevur ferðast hagar er klaksvíkingurin Absalon Matras. Hann er í Rumenina einar 5-6 ferðir um árið, og fyrireikar seg nú til at fara enn ein túr seinni í hesum mánaðinum.

Hóast hann fær nógv klæðir og aðrar lutir við sær á hvørjum túri, so er hann nú komin í ta støðuna, at hann ikki fær tikið ímóti fleiri lutum frá fólki beint nú.

Hann hevur savnað hesi klæðini og lutirnar í eina goymslu í kirkjukjallaranum í Klaksvík.

– Men har er nú so fult, at vit ikki fáa tikið ímóti meiri beint nú. Hava fólk klæðir, so biðja vit tey um at goyma teg til einaferð í mai mánaði, tá vit aftur kunnu taka ímóti teimum, verður sagt.

**sb.**

## Fyrsta ferðin við fiski

**Vágur:** Hóskvøldið kom nýggjasta føroyska farmaskipið »Norland« til Hirtshals við farmi. Hetta var samstundis fyrsta ferðin, at vágbingar fáa eina beinleiðis rutu av slíkum slagi til europeiska meginlandið.

Hóast hetta er fyrsta royndin, so skilst á lagnum, at vágbingar og suðuroyingar í síni heild fegnast um henda nýggja flutnignsmøguleikan.

Sagt verður, at tað vóru serliga ísaðar vørur, sum vórðu fermdar umborð á Norland, ta løtuna hann lá við bryggju í Vági.

**sb.**